## Fyritøka:

# Hitar húsini uttan olju




Síðani vvs-fyritøkan, Hiti, varð stovnað á vári 2005, hevur virkið tikið seg nógv fram á marknaðinum. Ikki minst eru tað nýggju hitapumpurnar, sum veruliga hava skapt áhuga millum fólk.

- At byrja við vóru fólk nakað skeptiskt. Tey trúðu snøgt sagt ikki uppá, at tað bar til at hita eini heil hús, einans við at nýta hitan úr luftini, sigur Áki Mortensen, stjóri á Hita.

Fyrstu pumpurnar komu til landið móti sumri í fjør, og síðani er eftirspurningurin vaksin við stórari ferð, sigur Áki.

- Tað eru jú nógvir pengar at spara. Okkara pumpur nýta sjálvandi nakað av streymi, men tølini, sum vit hava staðfest higartil, sýna, at sparingin er úti við tveir triðingar, um økta streymnýtslan verður sammett við spardu oljunýtsluna. Og tí ganga ikki nógv ár, fyrr enn íløgan í pumpuna er vunnin innaftur.

Pumpan frá Euronom, sum Hiti selur, virkar at kalla sum eitt øvugt køliskáp. Hitastigini verða snøgt sagt tikin úr útiluftina, og síðani leidd í ein stóran tanga. Og prosessin er somikið effektiv, at tað ikki stendur á at hita eini vanlig sethús. Er tørvur á eyka orku, kunnu fleiri aðrar umhvørvisvinarligar orkukeldur eisini koblast á tangan. Eitt nú hava fleiri keypt sólarorku afturat luftini, men eisini ber til at seta jørðhita, hita úr brenniovni ella vatnhita afturat, um tørvur er á hesum.

Soleiðis eru hitapumpurnar at kalla flaggskipið hjá fyritøkuni, men Áki leggur dent á, at teir eisini veita allar vanligar vvs-vørur og –tænastur.

- Vit hava frá fyrsta degi lagt okkum eftir at vera heildarveitarar á vvs-økinum, og tí kunnu vit nøkta mest sum allan tørv innan økið, sigur hann.

























